# 20 pláss eftir

**Størsti parturin av ferðaseðlunum til fótbólsferðina hjá Atlantic Airways og Sosialinum eru seld, og úrslitini mikukvøldið mundu ikki gera áhugan minni**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Jákup Mørk*

Sum tað sæst aðra staðni í blaðnum, so er av álvara farið at ganga framá hjá FCK í kappingini um danska meistaraheitið.

Brøndby hevur higartil havt eina rættiliga trygga leiðslu, og áður hava leikararnir hjá FCK sagt, at gullið langt síðani er rokið, men so er kanska ikki kortini.

## Líkist stórdysti

Tá Atlantic Airways upprunaliga gjørdi av at skipa fyri ferð til dystin millum FCK og Brøndby, mundu teir ikki vænta, at talan kanska fór at gerast um avgerandi dystin um DM-gullið, men sum støðan er nú, er hetta als ikki óhugsandi.

Tá vit seinast høvdu samband við skrivstovuna hjá Atlantic Airways, vóru okkurt um 70 av teimum 90 ferðunum seldar. Roknast kann nú við, at seinastu 20 atgongumerkini verða seld rættiliga skjótt. Tá líknandi ferð varð fyriskipað í fjør – og tá var talan um avgerandi dyst – vórðu øll atgongumerkini skrødd burtur eftir einum degi, so føroyskir FCK fjepparar skulu nú kvika sær, um teir hava ætlanir um at síggja eina endurtøku av danska stórdystinum.



*Í fjør vórðu fótbóltsferðirnar til Parkina skræddar burtur eftir einum degi, og úrslitini mikudagin gera helst, at seinastu 20 atgongumerkini hesa ferð verða seld innan heilt stutta tíð*

## Enska 3. deild

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Luton | 44 | 29 | - | 6 | - | 9 | 94 | 48 | 46 | 93 |
| 2 | Plymouth | 43 | 28 | - | 9 | - | 6 | 63 | 27 | 36 | 93 |
| 3 | Mansfield | 44 | 23 | - | 7 | - | 14 | 59 | 57 | 2 | 76 |
| 4 | Cheltenham | 43 | 20 | - | 14 | - | 9 | 64 | 47 | 17 | 74 |
| 5 | Rochdale | 44 | 20 | - | 14 | - | 10 | 62 | 50 | 12 | 74 |
| 6 | R&D | 44 | 19 | - | 13 | - | 12 | 65 | 49 | 16 | 70 |
| 7 | Scunthorpe | 44 | 18 | - | 14 | - | 12 | 72 | 54 | 18 | 68 |
| 8 | Shrewsbury | 44 | 19 | - | 10 | - | 15 | 62 | 51 | 11 | 67 |
| 9 | Hartlepool | 44 | 18 | - | 11 | - | 15 | 65 | 47 | 18 | 65 |
| 10 | Kidderm. | 44 | 18 | - | 9 | - | 17 | 54 | 46 | 8 | 63 |
| 11 | Hull C. | 44 | 16 | - | 11 | - | 17 | 55 | 49 | 6 | 59 |
| 12 | Southend | 44 | 15 | - | 12 | - | 17 | 51 | 52 | -1 | 57 |
| 13 | Macclesfield | 44 | 15 | - | 11 | - | 18 | 41 | 52 | -11 | 56 |
| 14 | Exeter | 44 | 14 | - | 12 | - | 18 | 47 | 70 | -23 | 54 |
| 15 | Carlisle | 43 | 12 | - | 15 | - | 16 | 49 | 52 | -3 | 51 |
| 16 | York | 43 | 14 | - | 9 | - | 20 | 48 | 65 | -17 | 51 |
| 17 | Darlington | 43 | 13 | - | 11 | - | 19 | 55 | 65 | -10 | 50 |
| 18 | Torquay | 44 | 12 | - | 14 | - | 18 | 42 | 57 | -15 | 50 |
| 19 | Swansea | 44 | 13 | - | 11 | - | 20 | 50 | 68 | -18 | 50 |
| 20 | Leyton O. | 44 | 12 | - | 12 | - | 20 | 53 | 70 | -17 | 48 |
| 21 | Oxford Utd. | 44 | 11 | - | 14 | - | 19 | 52 | 58 | -6 | 47 |
| 22 | Bristol R. | 43 | 11 | - | 11 | - | 21 | 38 | 54 | -16 | 44 |
| 23 | Lincoln C. | 44 | 10 | - | 14 | - | 20 | 42 | 60 | -18 | 44 |
| 24 | Halifax | 44 | 7 | - | 12 | - | 25 | 33 | 78 | -45 | 33 |

**Føroyskir leikarar:** Julian Johnsson (Hull C.)

# Hvar er bólturin?

A B C D E

1 2 3 4 5



tað er ikki loyvt at kopiera henda lepa

**Navn:** ____________
**Bústaður:** ____________
**Tlf:** ____________
**Eg giti, at bólturin er í teigi:** ____________

**Seðilin skal sendast til:**
**Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.**
**Merkið brævbjálvan "FCK"**

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.
Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS






# Bilmekanikkari søkist

Søkt verður eftir bilmekanikkara at byrja beinanvegin.

**Bilfríðkan**
tlf. 317300 / 217300
Spyr eftir Ludvík

FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir.

Tosið við Eyðfinn Jacobsen, advokat um tygara tørv.

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901 · mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo

# Frá Vága Javnaðarfelag

Fundur fyri øllum javnaðaráhugaðum verður í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági fríggjadagin kl. 19.00

**Jóannes Eidesgaard**
**Katrin Dahl Jacobsen**

saman við valevnum Javnaðarfloksins í Vágum luttaka

Javnaðarflokkurin

S E M I N A R



TÚ ERT SIGNAÐUR FYRI AT VERÐA TIL SIGNING

v. Fríðtór Deb
16.-21. apríl

Hvørt kvøld:
Kl. 19.00 - 19.45 undirví
Kl. 19.45 - 20.15 kaffist
Kl. 20.15 - 21.00 undirví

Øll eru hjartaliga vælkomin!

Í RHEMA Á HÁLS

Fólkaflokkurin
Álit, Ábyrgd og Ágrýtni



Annika Olsen
www.annikaolsen.net

GAMAN Í ARGJA SKÚLA
Leygardagin 13/4-2002 frá kl. 15.00

Mattombola
Bommtombola
Café
Lutaseðlasøla
Klatriveggur
Fiskibrunnur
Hoppiborg
Ponyríðing
Sodavatnssøla

3.a í Argja Skúla

# Almennur kjakfundur

Almennur politiskur kjakfundur, undir heitinum »Framtíðar landbúnaður - vinnuligt jarðarbrúk«, verður í Bygdarhúsinum í Kollafirði leygardagin 13. apríl kl. 13.00.

**Umboð fyri flokkarnar verða:**
- Bjarni Djurholm
- Alfred Olsen
- Vilhelm Johannesen
- Høgni Hoydal
- Sámal Petur í Grund
- Petur Karl av Rana

Fundarstjóri verður Bjørt Samuelsen

**Bóndafelag Føroya**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1896, Sp/f Sofus Baldvinsson, 530 Fuglafjørður.

Stjórn:
Innkomin sum stjóri:
Sofus Oddberg Benadiktsson Baldvinsson, 530 Fuglafjørður.

Skráseting Føroya tann 10. apríl 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3329, Sp/f MiaRosa, 600 Saltangará.

Viðtøkur broyttar: 14.03.2002.
Roknskaparár broytt: 01.05.-30.04.
Fyrsta roknskaparár broytt: 01.03.2002-30.04.2003.

Skráseting Føroya tann 10. apríl 2002

Kristin Balle


# Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman írokna streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.05.02

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla & umbo - Tel. 315600 - Fax 318008

DYNAPAC
-maskinurnar sum halda!



- Asfaltleggjarir
- Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
- Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum til betong/stoyping
- Glittemaskinur
- Dykpumpur
- Eykalutir

Sosialurin - 311820

Keyp góðsku – keyp Dynapac!

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008